## Rýma undan veðurlagnum

Í seinastuni hava umleið 40.000 roysningar tikið seg saman í einum øki við russisku norðurstrondina, og sambært russiskum lívfrøðingum hava roysningar ikki hildið til har fyrr. Tað skrivar heimasíðan Science Daily. Ein talsmaður hjá Heimsnáttúru-grunninum WWF sigur við heimasíðuna, at tað er lítið at ivast í, at tað eru veðurlagsbroytingarnar, sum fáa roysningar at rýma frá sínum vanligu plássum og at finna sær nýggj støð í tí arktiska økinum.



## Dýrari at byggja

Tað seinasta árið er tað vorðið 6,6 prosent dýrari at byggja í Grønlandi, vísa tøl hjá hagstovuni í Nuuk. Við øðrum orðum eru útreiðslurnar til bygging vaksnar nógv meiri enn brúkaraprísirnir, sum eru hækkaðir umleið tvey prosent tað seinasta árið. Byggideildin hjá grønlendska arbeiðsgevarafelagnum sigur, at byggitilfar er dýrkað á altjóða marknaðinum, og at tað er hesin prísvøksturin, sum nú ger seg galdandi í Grønlandi.

# Fiskamarknaðurin hevur borgað fyri »røttum« fiskaprísi

**- Vit eru øll samd um, at Fiskamarknaður Føroya hevur verið kollveltandi fyri alla ta føroysku fiskivinnuna, sigur borgarstjórin í Nes kommunu, Símun Johannesen**

MÓTTØKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Vilmund Jacobsen*



*- Síðan Fiskamarknaður Føroya fór undir sítt virksemi, er bara gingið fram á við havnalagið, tí sum hann tók til, at "har gott fólk er, kemur gott fólk... "*

Við hátíðarløtuna á Toftum, nú Fiskamarknaður Føroya er farin um tey 15 árini, nýtti borgarstjórin í Nes kommunu, Símun Johannesen, eisini høvi til at ynskja FMF tillukku við degnum.

Borgarstjórin segði, at marknaðurin, sum lunnar vórðu lagdir undir í 1992, hevur havt stóran týdning fyri prísásetingina av ráfiski í Føroyum.

- Tann prísur, sum hevur verið latin her, er tað nærmasta, vit hava verið "røttum" prísum til fiskimenn og skip.

Símun Johannesen vísti á, at summi ár hevur út við helmingurin av ráfiskinum, sum kemur upp á land í Føroyum, verið seldur beinleiðiis um fiskamarknaðin, og prísurin fyri restina av fiskinum, sum ikki fór um marknaðin, hevur verið tengdur at hesum prísum.

- Fiskamarknaður Føroya hevur soleiðis verið kollveltandi fyri alla ta føroysku fiskivinnuna. Hetta eru øll samd um, legði hann aftrat.

### Ógvuliga takksom

Borgarstjórin duldi ikki, at bæði fólk í kommununi og tey, sum sita í kommunustýrinum, eru ógvuliga takksom fyri, at fiskamarknaðurin liggur her á gjónni, sum hann tók til og sipaði til Toftagjógv, ið er gamla navnið á staðnum.

- Hetta virksemi hevur havt ómetaliga stóran týdning fyri økið. Vit kunnu endurgeva orðafellið, at "har, sum gott fólk er, kemur gott fólk", sum vit plaga at taka til.

Hann vísit á, at síðan FMF fór undir sítt virksemi á havnalagnum hjá Nes kommunu, hevur tað bert gingið fram á.

- Í dag hava vit soleiðis eitt havnalag við nógvum virksemi, og útbyggingar eru framvegis í gongd, legði borgarstjórin aftrat.

### Meira atløgupláss

Símun Johannesen segði, at kommunan nú hevur framt ein part av tí ætlan, sum er millum havnalgið við Toftagjógv og eldra havnalagið, har virkið hjá Føroya Fiskavirking er.

- Hetta merkir, at vit fáa eina atløgusíðu, sum í hesum fyrsta partinum er 94 metrar til longdar. Vit vóna, at hetta kemur at lætta um, tá ið trýstið á landingarmiðstøðina er av tí mesta.

Borgarstjórin segði, at um stutta tíð verður farið undir at asfaltera økið, so hesin nýggi parturin av havnalagnum kann takast í nýtslu fyrst í komandi ári.

Símun Johannesen nevndi eisini annað virksemi og aðrar tænastur, sum eru komnar við havnalagið, síðan Fiskamarknaður Føroya fór undir sítt virksemi við Toftagjógv fyri 15 árum síðan.

Vegna Nes kommunu bar borgarstjórin virkseminum hjá Fiskamarknaði Føroya øll góð ynskir fyri framtíðina.



*Ann-Britt, kona borgarstjóran, Hermann og Elin. Aftanfyri sæst Auðunn Konráðsson, formaður í Meginfelag Útróðrarmanna*



*Stigtakarar og menn, sum hava balst eitt langt lív á sjónum. Aftanfyri Jógvan I. Olsen sæst Niclas Davidsen, landingarformaður*



*Harry Benjaminsen, formaður í Tofta Arbeiðarafelag, handar Óla Jacobsen heiðursgávu fyri trúgva tænastu. Somu gávu gekk eisini Jógvan I. Olsen*